

*Teimum dámar eisini væl at dansa føroyskum dans, so tey fóru eisini upp á gólv*



*Felagssangur er ein týðandi táttur av hugnaløtunum hjá pensjónistafelagnum*



*Selma Gaard skipaði felagssang*



*Knút Olsen setti dám á felagssangin við lívligum harmonikuspæli*



*Stundir vóru eisini til hugnaligt prát*

# Kundu hugsað sær betri umstøður

**Pensjónistafelagið í Havn hevur 32 ár á baki, og pensjónistarnir og limirnir vísa felagnum stóran áhuga. Tó kundu tey hugsað sær betri umstøður**

PENSJÓNISTALÍV

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú heystið er komið, er lív eisini so smátt farið at koma í felagsskapir av ymsum slagi, sum vanliga hava sítt virksemi um veturin, ímeðan tey liggja mestsum í dvala alt summarið.

Ein av hesum felagsskapum er pensjónistafelagið í Havn, sum nú hevur tikið virksemið uppaftur fyri veturin.

Felagið plagar at hava regluligar fundir frá nú í september til síðst í mai.

Pensiónistafelagið í Havn varð stovnað í 1976, og sostatt hevur tað nú 32 ár á baki.

Pensjónistar hava alla tíðina víst felagnum stóran áhuga. Limatalið vaks skjótt, og í løtuni eru einir 190 limir í felagnum.

Fólk skulu hava fylt 60 ár fyri at verða limir, men tó kunnu fyritíðarpensjónistar verða limir, frá tí at teir eru 55.

Limagjaldið er 150 krónur um árið fyri støk og 225 krónur fyri hjún.

Vanliga hittast tey einaferð um vikuna. Á hesum kvøldunum plaga tey at fáa onkran at siga frá onkrum forvitnisligum. Men tey vísa eisini film, umframt at tey spæla kort og annað og ikki minst, gongur prátið dúgliga.

Av og á vitja tey eisini onnur pensjónistafeløg, og viðhvørt fáa tey eisini pensjónistar ymsa aðra staðni frá at vitja.

## Betri umstøður at føra politikk

Fimm fólk sita í nevndini í pensjónistafelagnum í Havn. Umframt formannin, Suna Joensen, er nevndin mannað við Árna Johannesen, Bibi Haraldsen, Finni Johansen og Fridu Hansen.

Arbeiðið er sjálvboðið, men limirnir eru altíð fúsir at taka eina hond í, tá ið tað krevst.

Felagið hevur sínar fundir í Losjuni við Tinghúsvegin.

Tey kundu hugsað sær betri umstøður, men við einum góðum vilja gongur tað, siga tey.

Ein av teimum, sum avgjørt heldur, at pensjónistafelagið skal hava betri umstøður, er nevndarlimurin, Finnur Johansen.

- Vilt tú taka lívið av einum felag, skalt tú bara geva tí egin høli at húsast í, segði hann.

Hann vísti á, at í fyrstuni eftir at felagið varð stovnað, hittust tey á Hafnia í Havn, og tað gav býráðið teimum fíggjarligan stuðul til.

Á Hafnia fingu tey alt borið upp í hendurnar, og tá ið kvøldið var liðugt, var onki uppvask og onki upptak at hugsa um.

- Tá fingu vit stundir at hugna okkum og at føra eldrapolitikk, segði hann.

Men nú felagið er í egnum hølum, heldur hann, at alt ov nógv orka fer til at fyrireika, til at baka og til at kóka drekka og til at taka upp aftaná.

Tí var hansara ynski, at felagið slapp oman aftur á Hafnia sum skjótast fyri at sleppa undan øllum tí praktiska, og so at tey fingu betri umstøður til hugna og til at føra eldrapolitikk.